## Daewoo Matiz

Fyri P/f Trygd selja vit ein Daewoo Matiz se árg. 02 við skaða, hevur koyrt 14.000 km.

Bilurin kann síggjast hjá P/F Esmar Simonsen á Kambsdali.

**Tlf. 444405 ella 218821**

DAEWOO
- ein skilagóð avgerð!
P/f Esmar Simonsen
Tel. 44 44 05 · Fax 44 46 29

## Frá Arbeiðara-felagnum »Hæddin«

Ársaðalfundur verður leygardagin 28. februar kl. 15.00 í felagshølinum.

Skrá sambært lógini.

Er aðalfundurin ikki viðtøkuførur, verður eykaaðalfundur hálvan tíma seinni.

**Nevndin**

## 10 tons deksbátur



4 snellur, 16 svøvlalínir + bil. Er í góðum standi.
Kr. 380.000,-

**Tlf. 441897/286897**

## Útbjóðing

Vegna Gøtu kommunu verður arbeiðið at gera útstykking í Syðrugøtu hervið boðið út alment.

Arbeiði handlar í høvuðsheitum um at gera 200 m av vegi við tilhoyrandi tekniskum installatiónum.

Útbjóðingartilfari kann bíleggjast hjá EM Ráðgeving innan hósdagin 19. februar móti veðhaldi kr. 5.000,- sum verður at gjalda inn á konto í Føroya Banka, konto nr. 6460 - 2002657

Lisitatiónin verður í hølunum hjá EM Ráðgeving týsdagin 16. mars 2004 kl. 16.00. Boðini verða tá latin upp, og kunnu teir bjóðandi vera hjástaddir.

**EM Ráðgeving Sp/F**
Heiðavegur 15A 1. th. · FO-600 Saltangará
Tlf.: 47 77 00 · Fax: 47 77 01
t-postur: emr@kallnet.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3720
**Navn:** Sp/f AN-Maskinservice.
**Adressa:** Gráasteinsgøta 3, 100 Tórshavn.

**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 01.01.2004
**Viðtøkudato:** 01.01.2004
**Kapitalur:** Kr. 115.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 115.000,00 til kurs 100.
**Stovnarai**: Allan Norðfoss, Gráasteinsgøta 3, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Allan Norðfoss, Gráasteinsgøta 3, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari**: Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 01.01.2004 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er søla og umvæling av maskinum og annað í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

*Skráseting Føroya tann 12. februar 2004*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2738, P/F Faroe Cold Stores, 900 Vágur.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Johan Jan Albinus Dahl, Dalakrókur 15, 100 Tórshavn.
**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Johan Jan Albinus Dahl, Dalakrókur 15, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 12. februar 2004*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 3131, P/F Frost, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:**
03.06.2003
Lækkan av P/F-peningi við kr.250.000.00 til kr.500.000,00 til kurs 152, viðtikið 03.06.2003 er nú gjøgnumførd.
**Kapitalur:** 500.000,00.

*Skráseting Føroya tann 12. februar 2004*
*Kristin Balle*

---

## Erogterapeutur/ Fysioterapeutur til Hjálpartólamiðstøðina (HTM)

Á HTM er eitt fyribilsstarv sum Ergoterapeutur/Fysioterapeutur leyst at seta beinanvegin. Setanartíðin verður 3 - 6 mánaðar.

HTM er deild á Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 14 fólk á HTM.

**Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.**
- upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar
- útlán og endurnýtsla av hjálpartólum
- viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðar-broytingar og avlamisbilar.
- tvørfakligt samstarv - innan- og uttanhýsis

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur:**
- útbúgving sum ergoterapeutur / fysioterapeutur
- royndir frá líknandi arbeiði er ein fyrimunur
- góð samstarvsevnir
- telduførleika á brúkarastøði

**Vit kunnu bjóða:**
- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- tætt samstarv við starvsfelagarnar
- samskifti við viðskiftafólk
- fakligt mennandi umhvørvi

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen leiðara á HTM tel. 358300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum og viðmerking um hvørt av starvinum søkt verður um skal sendast til

**Hjálpartólamiðstøðina**
Postboks 1049
110 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 23. februar 2004 kl. 14.00.


SUZUKI ALTO 1,1
*úr einans*
**105.000,-**
16V við 63 HK
Bensinnýtsla:
20,4 km/l
blandað koyring



www.suzuki.fo
**Spf. Eyðbjørn Hansen**
FO-100 Tórshavn • Tel. 313375 og 213375


Lesið Sosialin

## Partabræv til sølu

1 partabræv í Sp/f Niels Paula til sølu fyri hægsta boð.

**Tlf. 777 211**





*Týski verkfrøðingurin, Alexander Noack, h.m. handar her Erlingi Simonsen VW Transportaran eftir umbyggingina til rapsbil. Nú eigur Erling tveir rapsbilar*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

# Talið á rapsbilum tvífaldað

**Rættuligir rapsdagar vóru í Havn í síðstu viku. Týski verkfrøðingurin, Alexander Noack frá Elsbett Technologie GMBH, hevur á fundi greitt frá um rapsbilar og bygt ein annan bil hjá Erlingi Simonsen um til rapsbil**

RAPSBILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Hósdagin 12. februar var kunnandi fundur á gistingarhúsinum Bládýpi í Havn um rapsolju sum alternativt brennievni til bilar og onnur akfør.

Umleið 30 fólk møttu til fundin, har Erling Simonsen greiddi frá sínum royndum við rapsolju, nú eitt ár er liðið síðan hansara VW Lupo bleiv bygdur um til rapsbil.

Síðan greiddi týski verkfrøðingurin, Alexander Noack, ið starvast hjá fyritøkuni Elsbett Technologie GmbH, frá um bilar, ið koyra við raps- ella matolju og um hvørjir bilar kunnu byggjast um, og hvussu hetta veður gjørt.

Fyritøkan Elsbett Technologie GmbH bleiv stovnað í 1965, og hava teir patent upp á meira enn 400 ymiskar tekniskar loysnir sum t.d. innspræningarskipanir til diesel- og bensin bilar og nógvar aðrar umhvørvisvinarligar loysnir. Eisini sett til at umbyggja dieselbilar til rapsbilar.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, var ið á fundinum, og hann segði m.a. at nýggja landsstýrið kemur at gera nógv við orku- og umhvørvismál.

Hann nevndi eisini møguleikan fyri at vit t.d. kundu havt lægri toll og avgjøld á



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, segði at nýggja landsstýrið kemur at gera nógv við umhvørvismál*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

umhvørvisvinarligum bilum, sum gjørt verður í fleiri av grannalondum okkara. Eisini kundu royndir verið gjørdar við umhvørvisvinarligum bussum, og meira kundi meira gjørt við við t.d. aldu- og vindorku. Bjarni segði, at Erling Simonsen hevði verið ein slóbrótari innan hetta øki.

Leygardagin 14. februar tvífaldaðist talið av rapsbilum í Føroyum, tá Alexander Noack var liðugur við at byggja ein annan bil hjá Erlingi Simonsen - ein VW Transporter - um til rapsbil. Arbeiðið varð gjørt á Bilasøluni v. Øssur Johannesen í Hoyvík.



*Fundurin á Bládýpinum var áhugaverdur, nógv fólk møttu og nógvir spurningar vórðu settir*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Bilurin bleiv umbygdur á bilverkstaðnum á Bilasøluni v. Øssur Johannesen í Hoyvík. Á myndini: Jakku Guttesen, verkførari, og Alexander Noack, frá Elsbett Technologie GmbH*
*Mynd: Jens Kristian Vang*